HVUSSU VIÐ SKULDSETINGUNUM?

Her hava vit søguna um ein kendan danskan politikara, ið alment viðgongur at hann er nazistur, men ikki nóg mikið við tað. Hann ásannar eisini, at Nazistaflokkurin, Danmarks Nationalsocialistiske Bevægelse er á vinstravonginum. Stik den.

Hendan avdúking kom kanska heldur enn ikki dátt við hjá okkara egnu sosialistum og tjóðveldismonnum, ið ferð eftir ferð hava skuldsett ávísar kreftir innan Fólkaflokkin at vera nazistiskar, og sum hava lagt »prógv eftir prógv« á borðið í sínum pástandum.

Men hvør veit? Kanska hendan grein eisini kann nýtast sum eitt tílíkt »prógv«.

Men spennandi verður at vita, hvussu tær víðgongdu kreftirnar í Javnar- og Tjóðveldisflokkinum, so sjálvrættvísir og klókir sum teir altið eru, megna at snara hesari søgu til egnan fyrimuns.

PO

Niðurstøða av grein í Dagblaðnum 29. januar.

um at renna ørindi fyri KGB eisini ein beinleiðis skuldseting um landasvik.

Hvat merkir tað at vera landasvíkjari?

Hetta kann í veruleikanum best lýsast við at endurgeva ein part av eini grein, sum kendi danski blaðmaðurin Gunnar Helweg-Larsen hevði í Kristeligt Dagblad 21. februar 1941. Hann skrivar m.a. um svíkjarar og landasvíkjarar:

Intet er så usselt som forræderiet ... At svigte sit land er forfærdeligt ... Intet indbyder i den grad til foragt, som at se en landsmand udlevere landsmænd ... Fra tidernes morgen og i alle lande har forræderens lod været anset for den usleste af alle ...

Síðan endurtekur hann eina yrking hjá norska yrkjaranum Arne Garborg, har hesin lýsir tær kenslur, sum teir gomlu norðbúgvarnir høvdu móti svíkjarum, og er hetta sjálvsagt galdandi til allar tíðir:

So vere vigd til Hel
kvar redde svikarsjel
i Noregs land,
kvar den, sum trulaust fôr
i verk og svikfullt ord
mot heim og fedrajord
dømd vere han!
Heng ham i neste tre —
grav ham som pestfeng ned
på ubygd öy!
Og ingen gravstein grå
på denne haugen stå,
hans namn i glöyme gå
hans minne döy!

Henda framferð móti annarleiðis hugsandi hevur eitt heilt ávíst endamál, nevniliga at skapa »landasvíkjarunum« ringast hugsandi umdømi millum manna. Hvussu væl hetta kundi eydnast fáa vit eina óhugnaliga mynd av við at lesa ta meting um herferð nasistanna, sum Hartvig Frisch setti fram longu í 1933 í bókini »Pest over Europa«:

»Her genfinder vi det hele: den bevidste løgn, det lave åndelige niveau, de groveste fordrejelser udelukkende beregnet på at tale til følelser og fornemmelser, den prinsipielle ensidighed, der på forhånd berøver modstanderne enhver menneskeret, ikke blot overbevisning, ære og fædrelandskærlighed, men endog fælleskabet med det folk, de tilhører.

Tað var kanska onkur, sum so tíðliga sum í 1933 helt hesa herferð vera meinaleysa og stuttliga. Sjálvt um vit kenna hesa mannagongd aftur, skal bert verða nevnt her, at júst tað at fráteka andstøðingum fedralandskærleika, var ein partur av grundarlagnum fyri ti, sum seinni hendi.

Tað vóru mong, sum hildu hesa framferð vera rættuliga meinaleysa tá, men tað søgdu tey ikki 12 ár seinni.

Fyrimunur við halleysum skuldsetingum

Tær rørslur, sum her eru umtalaðar, hava sjáldan nakað serligt hald í sínum skuldsetingum. Og skuldsetingar um t.d. landasvik eru eisini ætlaðar heilt øðrum endamálum. Men so merkiligt tað ljóðar, er tann sum nýtir slíka mannagongd betur fyri enn tann, sum t.d. tað verður roynt við hesi grein, sum heldur seg til veruleikan. Hitler visti longu meðan hann skrivaði »Mein Kampf« hvussu hann skuldi fáa fólk í sitt vald, og tað hann her skrivaði man vera tað mest sanna hann nakrantíð hevur fert fram. Sum tað verður sagt í donsku týðingini:

Enhver propaganda skal være folkelig og indstille sit åndelige niveau på oppfattelsesevnen hos den mest indskrænkede blandt dem, den vil henvende sig til.

Og tann politikkur, sum er umtalaður her, má sigast at liva heilt væl upp til hesa uppskrift.

Teir, sum standa aftanfyri hendan politikk her á landi, áttu kannað søguna eitt sindur betur. Tá høvdu teir sæð, at á flest øðrum økjum høvdu teir tá kunnað fingið sama samsvar millum teirra politikk og annars tann, sum her hevur verið umroddur.

Læran av søguni er nevniliga tann, at »óndsinnað« nýta somu framferð uttan mun til tíð ella stað, og uttan mun til hvat teir sjálvir siga seg standa fyri.

Óli Jacobsen



Hugsa sær til, at føroyingar skulu virka sum skutilssveinar fyri kommunismuna, ið hevur verið atvoldin til meira blóð og deyða, enn sjálvt tann svárasta umfarssótt, ið herjað hevur heimin. Nei, skiljið

tað hvør sum skilja vil. Vit á Dagblaðnum og mong við okkum, skilja tað so ikki.

Men tað er vist okkurt, ið eitur landasvíkjarar.

Sjálvt kjakið um sovjetiska fiskiveiðusáttmálan verður so seint sum 1. februar 1988 nýttur sum paskot at skira landsmenn landasvíkjarar



Frásetingarøkið á Sundi

letur upp mánamorgunin 8. februar 1988, kl. 08.00.

Plássið er serliga ætlað lastbilum úr Tórshavnar kommunu.

Nærri upplýsingar fáast frá plásseftirlitinum á tlf. 108 34 í vanligari arbeiðstíð.

Tórshavnar býráð

Marita
exam. zoneterapeutur
zoneterapiviðgerð
Landavegur 5 Telefon 166 60